**Sion, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin. Mánakvøldið kl. 21 Bønarmøti og bønartænasta á tlf. 373777. Tú ert vælkomin at ringja um tær tørvar forbøn.

**Missiónshúsið, Hvalba**
Evnismøtir verða vikuskiftið 7. til 9. nov. Nærri lýst seinni.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 6. oktober*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.30-18 Myndaveving á loftinum.
kl. 10.30-18 Seyma fýrkantar saman til teppir
kl. 14-18 Kortspæl, telving, landastrok, bobbspæl,dart og onnur spøl.
Tilmelding til døgurðan miku- og fríggjadagin, tlf. 316491
*Týsdagin 7. oktober*
kl. 10-12.00 Vit baka
kl. 10-11.30 Vit syngja – Eyðun Sørensen. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 14.30 Hilma Frýdal sigur frá um hvussu tað var at koma til Havnar í kostskúla hjá nonnunum 1937
*Mikudagin 8. oktober*
kl. 10-13.00 Matgerð. Anne Grethe Harlou
kl. 12.00 Døgurði. Tilmelding mánadag á tlf. 316491
kl. 15.00 Túrur – sjá skránna í bløðunum
*Hósdagin 9. oktober*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17.00 Telduprát, Brandur Petersen
*Fríggjadagin 10. oktober*
kl. 10-13.00 Matgerð, Anne Grethe Hourlou
kl. 12.00 Døgurði. Til ber at koma sum gestur. Tilmeld. mánadag tlf. 316491
kl. 13-17 Opið hús

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Tilhaldið Hugnin í Sandoynni**
Tilhaldið í Sandoynni er opið mánadag og mikudag frá kl. 14-17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa.
*Mánadagin 6. okt:*
Vit eta døgurða saman. Byrjað verður kl. 17 í Virkinum á Sandi. Eyðun Viderø spælir harmoniku og vit syngja. Neyðugt er at melda seg til í seinasta lagi leygardagin á tlf. 361990. Kostnaður uml. 100 kr.
*Mikudagin 8. okt.:*
Sólrun Christiansen lesur 5. brot úr søguni »Sin egen lykkes smed«.

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Spælistovan í meinigheitshúsinum**
er opin mána-, miku- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postadressa: J. Paturssonargøta 24, 100 Tórshavn.
Formaður: Óluva Vilhelmsen.
T-postur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Tlf. 322686 / 319629

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh. tlf. 319630/61 655400.

**NA (Anomymir narkomanar)**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fundur er hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00.

**ACA**
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 á Tinghúsvegi 37, Tórshavn. www.aca-danmark.dk.
E-mail: acafaroeislands@hotmail.com

**AA-fundir í Havn**
**Tinghúsvegur 37**
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.15
Mikudag: Sporafundur kl. 20.00–21.00
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: kl. 9.00-10.00 opin fundur. Kl. 17.00–18.00
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Allir fundir eru roykfríir.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 í Al-Anon, Tinghúsvegur 37. Telefontíð er fríggja-, leygar-, sunnu- og mánadag frá kl. 19-21 á tlf. 508030.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

# TILTØK

## 65 ÁR

Mánadagin 6. oktober fyllir Jóhannes Jóhannessen, Kolbeinagjógv, 65 ár. Dagurin verður hildin heima. Øll eru vælkomin.

## 80 ÁR

6. oktober verður Jonna Jacobsen, Fitjar, Vestmanna, 80 ár. Dagurin verður hildin saman við familjuni.

## 90 ÁR

Í dag, 4. oktober verður Sigrid Eysturdal, Klaksvík 90 ár.

### Konfirmantar í Havnar kirkju 05.10.2003

Hans Kári Hansen, Mouritsarvegur 12, Hoyvík
Anna Mai Nattestad, Bókbindaragøta 10, Havn
Ragnar Jákupsson Sigvardsen, Sundsvegur 5, Havn
Jastrid Mathea Rein Jensen, Javnagøta 9, Havn
Barbara Michalina Tausen, Millum Gilja 62, Hoyvík
Erika Majbritt Vilhelmsen, Hamarsgøta 7, Havn
Billa Jenny Jónleifsdóttir, Stoffalág 2, Havn
Teinar Mohr Hentze, Millum Gilja 163, Havn
Jógvan Jacobsen, Hamarsgøta 8, Havn
Tróndur Høgnason Mohr, Gamli Vegur 3, Hoyvík
Heini Gilstón Corfitz Andersen, Vípuvegur 17, Havn
Julia Mortensen, Spógvavegur 5, Havn
Høgni Kruse Johannesen, Millum Gilja 149, Hoyvík
Elisabeth á Gadd Clementsen, Miðtún 3, Havn
Ragnar Joensen, Aggusteinusvegur 3, Hoyvík
Maria Kristina Johansen, Tinghúsvegur 68, Havn
Eirikur Nybo á Kletti, Varðabyrgi 10, Havn
Jóhannis Liasson Rasmussen, Djúpagilsvegur 12, Hoyvík

### Konfirmantar í Tvøroyrar kirkju sunnudagin 5. oktober

Jóan Petur Jacobsen, Fámjin
Hallur Kjærbæk, Øravík
Flóvin í Ólavstovu, Øravík
Mariann Mikkjalsdóttir, Trongisvágur
Krista **Jónvør** Schrøter Joensen, Tvøroyri
Katrin Petersen, Tvøroyri
Reidar Petersen, Tvøroyri
Inge Marie Rasmussen, Tvøroyri
**Aleksandra** Rudi Michelsen, Froðba
Roald Olsen, Froðba

### Konfirmantar heystið 2003 í Christianskirkjuni 5. oktober

**Norðoyri**
Eli Carlsen

**Haraldsund**
Leivur Lydersen
Rasmus Magnussen

**Árnafjørður**
Knud Petersen

**Klaksvík**
Lindi Gardar, Undir Hálsi 16
Atli Henriksen, Undir Hálsi
Jóhannes Højgaard, Mylnutún 19
Gunnar E. Jacobsen, Ziskagøta 19
Heri Muller Jacobsen, Undir Klakki 25
Kaj Muller Jacobsen, Undir Klakki 25
Jákup Bernhard Brim Joensen, Kjalarskákið
Jóhannes Klakk, Vágsgeil 13
Uni Mikkelsen, við Mylnutún 19
Knud Petersen, Víkavegur 87
Jóhan Sigurðsson, Bumshamarsvegur 27
Flóvin Váðklett, Bøgøta 23
Leon Viðbjørg, Bumshamarsvegur 30
Jógvan Vilhelmsen, Hamarssniðið
Helena Christiansen, Traðagøta
Karina Hansen, Traðagøta 11
Hjørdis Jacobsen, Bumshamarsvegur
Ella Mørkøre, Traðagøta 5
Bjørg Olsen, Undir Hálsi 7
Elsa Petersen, Kjalarvegur 31
Natalia Reinhardt, Stangavegur 46
Maria Ziskason, Á Brekku 53

### Konfirmantar í Fríðrikskirkjuni sunnudagin 5. oktober 2003 kl. 11.00

Per Martin Gregersen, Norðragøta

**Saltnes**
Levi Anthoniussen
Sarita Djurhuus
Jaspur Jan Olsen
Dávid Reinert Petersen
Tonny Simonsen Saltá

**Nes**
Katrin Frederiksberg
Sunniva Reginsdóttir Jacobsen

**Toftir**
Poula Grunnveit
Diana Jógvansdóttir Hansen
Oddur Árnason Højgaard
Petur Højgaard Kristensen
Mads Nesá

### Konfirmantar í Vágs kirkju sunnudagin 5. oktober 2003

Svava Vestergaard, Vágur
Rakul Marita Petersen, Vágur
Mona Østerø, Vágur
Marna Ingeborg Hentze, Sumba
Elin Poulsen, Lopra
Winnie Poulsen, Porkeri
Karina Tausen, Porkeri
Ann Hansen, Porkeri
Poli Stenberg, Vágur
Henning Joensen, Vágur
Búgvi Petersen, Vágur
Hans Jacob vi_ Kvíggjá, Sumba
Marner Gudmundsen, Sumba
Rói Vestergaard, Akrar
Sveinbjørn Borg Larsen, Porkeri
Jaspur Tausen, Porkeri
Helgi Stenberg, Porkeri
Jón Poulsen, Porkeri

### Konfirmantar 5. oktober 2003 í Vesturkirkjuni

Jákup Pæturssonur Dam, Norðurrás 4, 100 Tórshavn
Sofus Foldbo, Brattabrekka 20, 100 Tórshavn
Jarleivur Hansen, Heygskrókur 4, 100 Tórshavn
Rói Hansen, Flatnagerði 10a, 100 Tórshavn
Tórður Áki Jacobæus, Fjalsgøta 46, 100 Tórshavn
Janus Jakobsen, Tjóðhildargøta 5, 100 Tórshavn
Sigmund Jørgensen, Heygsmannavegur 5, 100 Tórshavn
Ásgrímur Hammershaimb Lützen, Fagralíð 16, 100 Tórshavn
Martin Midjord, Garðsgøta 25A, 160 Argir
Óli Jákup Müller, Purkugerði 10, 100 Tórshavn
Sjúrður í Sandagerði, Dr. Dahlsgøta 17, 100 Tórshavn
Bárður Sørensen, Brúnagøta 11, 100 Tórshavn
Jákup Rani Thorsteinson, Varðabú 36, 100 Tórshavn
Bryndis Hjartardóttir Andreasen, 175 Kirkjubøur
Belinda Sigmundsdóttir Berg, Bókbindaragøta 4, 100 Tórshavn
Rannvá Clementsen, Á Heygnum Mikla 8, 100 Tórshavn
Erla Eliasen, Torsteinsgøta 6, 100 Tórshavn
Heidi Hansen, Tórsteinsgøta 7, 100 Tórshavn
Tóra Signhild Høgnaberg, Sleipnesgøta 8, 100 Tórshavn
Óluva Brynhild Fríðheim Jacobsen, Hetlandsvegur 10, 100 Tórshavn
Barba Jansdóttir, Handan á 17, 100 Tórshavn
Irena Áarberg Joensen, Krosslíð 9, 100 Tórshavn
Rósa Maria Johannesen, Marknagilsvegur 54, 100 Tórshavn
Eyð Justinussen, Undir Gráasteini 61, 100 Tórshavn
Joanida Herlona í Kálvalíð, Folagerði 8, kj., 100 Tórshavn
Katrin Debes Kristensen, Sílagøta 7, 100 Tórshavn
Óluva Mohr, Landavegur 72, 100 Tórshavn
Andrea Skeel Nolsøe, Brattalíð 21, 100 Tórshavn
Helena Viberg Olsen, Fjalsgøta 21, 100 Tórshavn
Bea Petersen, Birnugøta 27, 100 Tórshavn
Birita Rubeksen, Undir Gráasteini 74, 100 Tórshavn
Jónvør Silvurstein, 280 Hestur
Matilda Sivertsen, Hákunargøta 1, 100 Tórshavn
Katrin Malena Skarðhamar, Sleipnisgøta 13b, 100 Tórshavn
Heidi Johanna Gunnerim Thomsen, Háskúlavegur 15, 100 Tórshavn
Bergljót Gyðja Trónd Tróndardóttir, J. Paturssonargøta 49, **(Dagurin hildin á Kráarvegi 6)**, 100 Tórshavn
Anna Davina Zachariasen, Bóndaheygur 17á, 100 Tórshavn



# Jóhan á Plógv settur sum leiðari

TÍÐINDASKRIV

Mentamálaráðið hevur sett Jóhan á Plógv í starv sum leiðari fyri verkætlanina skúlatilboð til ung við breki.

Jóhan á Plógv er 35 ára gamal. Hann tók prógv sum bygningssnikkari í 1991, námsfrøðiútbúgving í 2001 og útbúgving sum seksualráðgevi fyri menningartarnað í 2002.

Jóhan hevur m.a. starvast sjómaður, bygningssnikkari og sum námsfrøðingur hjá ungum og menningartarnaðum í skjótt 11. ár.

Mentamálaráðið hevur keypt hús í Runavík til endamálið. Talan er um eitt heildartilboð, sum er sett saman av bústaði, skúla og arbeiði og hvørs endamál er at menna tey ungu til at virka sjálvstøðugt í arbeiðslívi og tí dagliga degnum. Høvuðsdentur verður lagdur á ítriv, arbeiði og praktiska upplæring. Skúli skal í hesum høpinum síggjast frá einum víðkaðum sjónarmiði í mun til vanliga bókliga skúlan. Ein partur av undirvísingini skal vera undirvísing og venjing í at búgva uttan fyri heimið - antin í egnari íbúð ella í sambýli við øðrum eftir at undirvísingartilboðið er liðugt. Venjing í at húsast er ein týdningarmikil partur av undirvísingini, tí eitt sjálvstøðugt lív er treytað av, at næmingarnir hava kunnleika til tey krøv, samfelagið setur og kunnleika til rættindi og skyldur.

Næmingarnir byrja væntandi skúlagongdina fyrst í komandi ári.

# Norðoyggjar og Vágar samstarva yvir fyri undirsjóvartunnlunum

TÍÐINDASKRIV

Umboð fyri Klaksvík og Vágar hava á fundi á Hotel Vágum í dag millum annað avtalað at kanna brúkaragjøldini í Vágatunnlinum, og umboð fyri báðar partar fara í næstum at biðja um fund við P/f Vágatunnilin og P/f Norðoyatunnilin um málið.

Nú skjótt eitt ár er síðan, at undirsjóvartunnilin varð liðugtgjørdur um Vestmannasund, og fasta vegasambandið um Leirvíksfjørð av álvara nærkast, hava hesi bæði lokaløkini nátúrliga nøkur felags viðurskifti og áhugamál at samskifta og møguliga eisini samstarva um.

Á fundi á Hotel Vágum í dag hittust tveir bólkar úr Vágum og Norðoyggjum at tosa um felags áhugamál í sambandi við undirsjóvartunnlarnar.

Talan er um tann sonevnda Vágabólkin, ið er mannaður av umboðum fyri kommunurnar, vinnuna, løgtingslimir og pendlarar í Vágum.

Klaksvík er her umboðað av einum stýrisbólki, sum arbeiðir við at fyrireika Norðoyggjar til at taka ímóti fasta vegasambandinum. Umframt borgarstjóran í Klaksvík, sum er formaður, er hesin settur saman av umboðum fyri vinnuna, skúlaøkið, heilsuøkið og fíggjarøkið í Norðoyggjum.

Vágabólkurin, sum sá dagsins ljós, tá P/f Vágatunnlin legði fyrstu brúkaraprísirnar fram, hevur arbeitt við hesum máli í eina tíð, og tað var í tí sambandi at bólkarnir møttust til fundar at tosa um møguligt samstarv.

Partarnir samdust um í felag at kanna nýtslugjøldini í sambandi við Vágatunnilin og at arbeiða við einum útspæli um, hvussu hesi best verða skipaði. Her er Vágabólkurin nátúrliga komin longur enn Stýrisbólkurin í Norðoyggjum, tí Vágar longu eru brúkarar av tunnlinum, men partarnir eru samdir um, at royndirnar hjá Vágum eiga at koma Norðoyggjum til góðar, tá Norðoyatunnilin verður tikin í nýtslu.

Avtalað er at biðja P/f Vágatunnilin og P/f Norðoyatunnilin um fund í næstum, har tvey umboð fyri hvørt lokaløki fara at leggja fram tøl og grundgevingar fyri einum prísbýti, har tey, ið brúka tunnilin mest, fáa ein betri prís, enn galdandi er í dag.

Í hesum sambandi hevur Vágabólkurin tann 23. september biðið um ymiskar upplýsingar frá P/f Vágatunnlinum, sum bólkurin vónar at fáa svar uppá ein av komandi døgunum.



Tá hesir upplýsingar fyriliggja, fara partarnir at arbeiða við einum útspæli til nevndina fyri Vágatunnilin og Norðoyatunnilin.




**HAVNAR BIO**
**Tlf. 31 19 56**
**www.bio.fo**



Leygardagin 04.10. kl. $23^{00}$
Sunnudagin 05.10. kl. $22^{15}$



Leygardagin 04.10. kl. $20^{30}$
Sunnudagin 05.10. kl. $20^{00}$



Leygardagin 04.10. kl. $19^{30}$
Sunnudagin 05.10. kl. $19^{30}$



Leygardagin 04.10. kl. $22^{30}$
Sunnudagin 05.10. kl. $22^{30}$



**Billettprísur: 45,- kr.**
Leygardagin 04.10. kl. $18^{30}$
Sunnudagin 05.10. kl. $18^{00}$

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**